# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:



**1. Tøm Miklagarð**
Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú fært stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

**2. Dreymaferð við nýggju Norrönu**
Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720



# ítróttur

Nr. 150 • fríggjadagur • 9. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Øssur gevst á landsliðnum



*Øssur Hansen gevst á landsliðnum, eftir at hava umboðað Føroyar 49 ferðir.*

*Mynd: Savnsmynd*

**31 ára gamli B68 veteranurin hevur ikki longur umstøður at brúka tíð til landsliðsfótbólt, og tí verður hann standandi á 49 landsdystum**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Henrik Larsen, landsliðsvenjari, boðaði í gjár frá, hvørjar spælarar hann ætlar at hava á átjan manna liðnum, sum mikudagin í aðru viku fer at spæla vinardyst ímóti Liktinstein, er ta. Tann dysturin verður einasti fyrireikingardysturin til EM undankappingina, sum tað verður farið undir seinni í summar, og sum verður á skránni til í oktober komandi ár.

Ein av føstu monnunum á landsliðnum seinastu tíggju árini er ikki longur tøkur á landsliðnum. Tað er Øssur Hansen úr B68. Hann hevur í hesi vikuni boðað Jógvani Martin Olsen, hjálparvenjara hjá landsliðsvenjaranum, frá, at hann ikki longur hevur umstøður at spæla á landsliðnum.

Øssur Hansen var fyrstu ferð á landsliðnum í vinardystinum á útivølli ímóti Noregi 13 mai í 1992, og hann hevur spælt 49 landsdystir og skorað tvey mál. Bara tríggir spælarar eru skrásettir fyri fleiri landsdystir enn Øssur Hansen.

– Alt hevur tíð sína, og nú er mín tíð á landsliðnum liðug. Eg havi familju og gangi við ætlanum um at fara undir at byggja. Tað hevði kanska borið til at spælt á landsliðnum, men hugurin er ikki so góður longur, at eg vil ofra ta tíðina og orkuna, sum skal til, tá tú spælur á landsliðnum, sigur Øssur Hansen. Hann veit, hvat hann tosar um, tí hann hevur verið á landsliðnum í tíggju ár. Dagliga yrki hjá honum er at vera landformaður hjá einum av óføru útróðrarbátunum á Toftum, og so arbeiðir hann viðhvørt sum elektrikari.

Men tær restar bara ein dyst í teir hálvt hundrað?

– Tað hevði sjálvandi verið stuttligt at spælt landsdyst nummar 50, men soleiðis verður tað ikki. Við einum nýggjum venjara verður sjøtul nú settur á eitt nýtt tíðarskeið á landsliðnum. Eg fekk um endan á fyrsta tíðarskeiðnum, sum var tað hjá Páll Guðlaugsson, og eg havi havt møguleika at vera við alt tíðarskeiðið, sum Allan Simonsen var venjari. Tað hevur verið sera hugaligt og spennandi. Nógvir ungir og evnaríkir spælarar eru klárir at taka við. Soleiðis skal tað vera, og eg ynski venjarum og spælarum alt tað besta, sigur Øssur Hansen, sum framvegis fer at spæla í B68.

*Hvør av teimum 49 landsdystunum, sum tú hevur spælt við í, stendur fremst í huganum?*

– Tað eru fleiri. Tað hevur verið hugaligt at vunnið, og tað hevur verið spennandi at spælt ímóti stóru fótbóltstjóðunum sum eitt nú Spania, Russlandi og Jugoslavia. Heimadysturin ímóti Slovenia á Svangaskarði í 2000 var nakað heilt serligt. Í síðstu løtu megnaðu vit at venda tí, sum sá út til at verða trygt 2–0 tap til 2–2, og eg var so heppin at skora útjavnandi málið upp á fríspark, tá vanliga leiktíðin var farin, minnist Øssur Hansen, sum eisini skoraði 30. apríl í 1997, tá Føroyar vunnu 2–1 á Malta. Ta ferðina javnaði Øssur við brotssparki til 1–1.

## Oddbjørn skal hjálpa Piotr



**Oddbjørn Joensen, sum hevur drúgvar royndir bæði sum leikari og venjari, er nú settur sum hjálparvenjari á besta mansliðnum hjá B36**

NÝGGJUR HJÁLPARVENJARI
*Páll Holm Johannesen*

Til dystin hjá B36 ímóti Skála sat nýggjur maður á beinkinum. Talan var um Oddbjørn Joensen, sum B36 hevur sett sum hjálparvenjara hjá 1.liði hjá felagnum.

Ætlanin er, at Oddbjørn skal verða hjálparvenjari burturav hjá besta liðnum, meðan fyrrverandi hjálparvenjarin, Sigfríður Clementsen, framyvir skal verða høvuðsvenjari hjá øðrum liði.

Um orsøkina til brádliga skiftið av hjálparvenjara, sigur formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, at felagið metti, at tveir venjarar var ov lítið til bæði 1. og 2.deild.

– Tað er ein sannroynd, at hópurin hjá okkum er somikið stórur, at neyðugt var við einum venjara afturat, sigur Kristjan á Neystabø.

Formaðurin í B36 vísir á, at fyri at spælarar í felagnum ikki skulu detta niður ímillum, so er neyðugt við trimum venjararum til 1. og 2. lið.

Spurdur um, hví skiftið er komið so seint í kappingarárinum, svarar Kristjan á Neystabø, at felagið vil til ein og hvørja tíð fremja broytingar, so at viðurskiftini í felagnum eru so góð sum gjørligt.

### Royndur hjálparvenjari

Nýggi hjálparvenjarin í B36 hevur drúgvar royndir sum bæði leikari og venjari. Oddbjørn Joensen er klaksvíkingur, og hevur hann spælt við KÍ, LÍF, og HB.

Oddbjørn vandi HB í 1997, og árið eftir var hann hjálparvenjari hjá B68. Í 1999 gjørdist Oddbjørn venjari hjá AB, og var við at tryggja argjamonnum uppflyting í 3.deild.